# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tjóðveldisflokkurin, Javnaðarflokkurin og umhvørvið

Umhvørvið og umhvørvisverja hava ikki staðið ovast á politisku breddunum seinastu árini, og tað sæst.

Nú hevur so Tjóðveldisflokkurin sett uppskot fram um at Føroyar skulu taka undir við Kyoto avtaluni. Endamálið við hesum er alla æru vert, men akkurát hvat gerast skal í Føroyum fyri at røkka høgt settu málunum, er í skrivandi stund eitt sindur óvist.

Tó er signalvirðið ikki at taka feil av. Tjóðveldisflokkurin vil markera seg sum ein flokk, ið tekur umhvørvisverju og umhvørvið í fullum álvara. Einstakir av tinglimum Javnaðarfloksins hava eisini roynt at markera seg á umhvørvisøkinum, og er tað somuleiðis alla æru vert. Hetta stuðlar undir ein varhuga av, at tað eru flokkarnir vinstru megin politisku miðjuna, sum eru teir mest ábyrgdarfullu, tá tað kemur til umhvørvisverju. Hetta sæst eisini í stevnuskráum teirra.

So kundi onkur helst hugsað tann hyptotetiska tanka, at um báðir flokkarnir á føroyska vinstraveinginum sótu í samgongu saman, so var ein betring í væntu á umhvørvisøkinum. Um stevnuskráirnar blivu fylgdar, so varð hetta helst úrslitið, men stevnuskráir eru ikki altíð tað, ið politikarar lesa mest.

Nú eru vit so heppin, at ein slík samgonga finst í størstu kommunu í landinum. Tórshavnar Kommuna verður stýrd av einari samgongu millum Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin. Og tá er heilt náttúrligt at spyrja, um hetta merkir, at Tórshavnar Kommuna er fyrimyndalig á umhvørvisøkinum, um orð og stevnuskráin sampakka við veruleikan í gerandisdegnum. Um teori og praksis fylgjast at. Siggja vit nakað ekkó í býráðssalinum av Kyoto hugburðinum hjá Tjóðveldisflokkinum á tingi? Síggja vit nakað spor av Kyoto hugburðinum á havnaskrivstovuni hjá Tórshavnar Havn, har Tjóðveldisflokkurin hevur formannin? Tað er synd at siga!

Javnaðarflokkurin og Tjoðveldisflokkurin í Tórshavnar Býráð eru í ferð við at byggja størstu bingjuhavn í landinum, men nokta blankt, at ein umhvørvisárinskanning av hesum ætlaða virksemi skal gerast, hóast borgarar hava biðið um hetta. Heldur ikki Olshana, sum burdi tænt sum greflig áminning, hevur fingið nakran úr stólinum hesum viðvíkjandi.

Tá flokkarnir, sum royna at marknaðarføra seg sum umhvørvisvinarligir flokkar, eru so líkasælir við nærumhvørvið, har teir ráða, hvar er so trúvirðið hjá hesum flokkum landspolitiskt?

Er tað politikkur Tjóðveldisfloksins og Javnaðafloksins at nokta fyri at gera eina umhvørvisárinskanning av einari stórari bingjuhavn inn í botninum av einum fjørði, eins og Tórshavnar Kommuna ger? Hetta hóast borgarar í stórum tali hava mótmælt? Eftir øllum at døma er svarið ja, og tí tykist umhvørvismedvit Tjóðveldisfloksins og Javnaðarfloksins einans vera spæl fyri gallarínum.

Sosialurin

## Lyklaorð fyri menning eru samskifti og samferðsla

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður
Fólkafloksins



**Skulu Suðuroyggin og Sandoyggin ikki avsigast sum økir í menning næstu 10-15 árini, sum vit hava sæð útoyggjarnar, er neyðugt, at Sandoyartunnilin verður settur í verk beinanvegin og at Magni Laksáfoss við sínum treiskni og stuttskygni ikki fær sín vilja**

Verður hugt at menningini ella rættari sagt tørvandi menning á útoyggj, er veruleikin, at fólkatalið er lækkað við út við 80 prosentum í góða hálva øld. Stór fráflyting hevur verið, meðan so gott sum ongin tilflyting. Orsøkirnar eru nógvar.

Tjúgunda øldin var eydkend fyri urbanisering ella flyting frá landi inn til býirnar um allan heim. Longu í 1900 hevði hetta við sær í USA, at frá at nógv flestu fólkini búðu úti á landinum hetta árið, búðu í 1920 nógv flestir amerikumenn í býunum.

Orsøkirnar til at allur heimurin er savnaður í størri økir eru nógvar, t.d. handilsligar, tænastuligar, samskiftis- og samferðsluviðurskifti, útbúgvingar og sosialar trongdir at verða saman. Ídnaðurin er broyttur frá at nógvar hendur skuldu til, til at tøknin í ídnaðinum hevur bent leiðir á lættari og meiri tekniskt skipaðar gongdir. Hetta hevur samstundis givið okkum bíligari vørur við hægri góðsku.

**Føroyar eisini savnaðar í størri øki**
Føroyar eru lítið oyggjaland, tí kom verulig gongd á eftir krígslok. Visiónsríkir politikarar, gávuríkur og sterkur landsverkfrøðingur løgdu lunnar undir at knýta bygdir og oyggjar saman, soleiðis at búgvandi og arbeiðandi gjørdist úti á økjunum. Hetta hevur givið dyggan útflutning av okkara fiskavørum, sum aftur hevur givið okkum ráðini til at fáa dugnalig og vælútbúgvin fólk, so vit framhaldandi og við skjótari øktum vøkstri kunnu á ymsum økjum gera um okkum eisini í útheimi.

**Valdi lættastu gongdina**
Á forsíðuni í Dimmalætting var yvirskrift "Kongur í Sambandsflokkinum". Her átti heldur staðið "Kongur í Havnini".

Magni Laksáfoss hevur rætt og slætt vælt mest ókompliseraðu og mest lættgongdu leiðina at siga: "Eingin Sandoyartunnil, eitt vældømi, tí upphitingin má tálmast!"

Her vitsti hann, at hann hevði sentralistisku politikkaranar úr ymiskum flokkum, ávís embætisfólk og ikki minst høvuðsstaðarfjølmiðar bæði á pappíri og í lofti við sær, og tað ræður um!

Sum nevnt, so ber ímóti sentralisering. Í øðrum londum verður miðsavnað inn í fleiri sterk øki, meðan okkara veika lið er, at vit bert sentralisera inn til høvuðsstaðin, heldur enn út í nøkur sterk øki. Tí fáa vit eitt fátækt land við tørvandi dynamikki.

**Mótarbeiddu eisini Vága- og Norðoyatunnlinum**
Fæst Sandoyartunnilin ikki í gongd nú, kann Suðurøkið við sínum sjeytúsund borgarum gloyma alt um alla menning ella rættari endurmenning av økinum.

Legg til merkis, hvussu nógv donsku politikararnir leggja herðslu á samferðsluætlanir og at byggja landið út við vegum, brúm og tunlum, og soleiðis fáa meiri dynamikk.

Hjá okkara núverandi landsstýrismanni í fíggjarmálum hongur ikki saman. Hann tosar um upphiting, tí verkætlanir krevja so nógv fólk. Hann túrar fram í treiskni og visjónsloysi.

Her eigur at verða víst til, at júst eitt mál sum Sandoyartunnilin, krevur eitt fátal av fólki, meðan eitt nú skúladepilin á Makrnagili, Granskingardepil o.o.l. mál skulu brúka hópin av fólki, júst í einum øki, har upphitingin ótálmað tekur til.

Verður hesi samgongu lívið lagað hesar mánaðirnar afturat, so hava vit eitt at gera, um ætlanin er, at Sandoyggin og Suðuroyggin ikki skulu avsigast komandi 10-15 árini og støðan gerst sum hjá hinum smáu oyggjunum, tað er, ikki at útseta hesa íløgu, men at vit gera hana nú, meðan vit kunnu fíggjarliga.

Tað tykist sum um, at sama fólkaferð mótarbeiðir Sandoyartunnlinum, sum mótarbeiddu Vága- og Norðoyatunnlinum. Men har vann tíbetur víðskygni.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Stórri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.